*Góðu tit!*

*Eitt evni, sum upptekur starvsfólk á eldraøkinum er, hvat og hvussu nógv starvsfólk kunnu kunna onnur búfólk um, tá onnur búfólk t.d. verða sjúk og kanska verða innløgd.*

*Á eldrabústovnum verða bond knýtt, og tað er ein náttúrligur partur av gerandisdegnum at hava áhuga fyri hinum húsfólkunum, og tá onkur saknast við borðið, er nærliggjandi at spyrja starvsfólkini, hvat er áfatt, tí sessurin stendur tómur.*

*Starvsfólk hava tagnarskyldu, men tað onki at siga, kann eisini kennast eitt sindur kunstugt.*

*Hvat er at gera, og hvussu kunnu starvsfólk fyrihalda seg?*

Góðu tit!

Stóra takk fyri spurningin.

Nevndin í SER hevur viðgjørt spurningin, við støði í Yrkisetisku leiðreglunum fyri sjúkrarøktarfrøðingar, Etiska Refleksjóns faldaranum og lóg um tagnarskyldu.

Hóast problematikkurin hevur etiskan karakter, slepst ikki undan, at onnur atlit eisini eru at taka í hesi støðuni. Juridiskir spurningar snúgva seg um, hvat ein *skal* gera, praktiskir spurningar snúgva seg um, hvat ein *kann* gera, meðan etiskir spurningar snúgva seg um, hvat ein *eigur* at gera.

Juridiska aftursvarið er rættiliga greitt. Viðurskiftir í samband við tagnarskyldu v.m. eru ásett í kap. 9 í Sundhedsloven og sambært § 40 í Sundhedsloven hava sjúklingar krav uppá, at heilsustarvsfólk *ikki* lata upplýsingar, sum tey fáa gjøgnum sítt starv, víðari til onnur. Tagnarskyldan fevnir eitt nú um upplýsingar í samband við diagnosu, kanningar, innleggingar, sálarligar ella sosialar trupulleikar. Útfrá einum løgfrøðiligum sjónarhorni, eru sjálvt maki og børn óviðkomandi, tá tað kemur til upplýsingar um heilsuna hjá einum sjúklingi. Tey avvarandi kunnu bert informerast, um sjúklingurin hevur givið samtykkið til hetta. Eitt samtykki kann vera munnligt ella skrivligt og skal skjalfestast í journalina.

Búfólk á ellis- og røktarheimum verða at rokna sum sjúklingar eftir sundhedsloven og eru sostatt fevnd av § 40, har tey hava krav uppá tagnarskyldu frá heilsustarvsfólki. Tað vil siga, at eitt starvsfólk kann ikki lata upplýsingar um heilsustøðu v.m. hjá búfólkinum víðari til onnur, heldur ikki onnur búfólk, uttan so, at búfólki sum talan er um, hevur givið samtykkið til tess.

Í praksis kann hetta tó viðhvørt vera ein avbjóðing, tí búfólk á ellis- og røktarheimum hava ofta áhuga og umsorgan fyri hvørjum øðrum, og tað er tvístøðan millum at virða umsorganina, búfólkini hava fyri hvørjum øðrum, tó uttan at bróta lógina, sum starvsfólk ofta finna seg sjálvan í. Tað er her vert at hava í huga, at verður tagnarskyldan brotin, verður álitið á starvsfólk skalað og øll búfólk kunnu kenna seg ótryggan av tí sama. Tað gongur sostatt ikki bara útyvir búfólki, sum er fyri órætti, men eisini útyvir øll hini, tí tey ikki kunnu kenna seg trygg við, at tagnarskyldan verður hildin um teirra viðurskifti heldur.

Eitt tilmæli frá SER er, at stovnarnir í tann mun tað ber til, royna at fyribyrgja, at støðan kemur í. Hetta kann t.d. gerast við at spyrja búfólk longu tá tey flyta inn, um tað er í lagi at siga hinum búfólkunum frá, at viðkomandi er innlagdur ella er illa fyri , skuldi tann støðan komið í. Siga tey ja, má tann játtanin førast í galdandi journalskipan. Hetta merkir ikki, at starvsfólk kunnu fara út í æsir við, hvat feilar. Endamálið skal verða at hjálpa upp á stúran millum búfólk og skapa karmar fyri og stuðla undir sínámillum umsorgan millum búfólk, sum uttan iva hevur nógv at siga fyri lívskvalitetin og trivnaðin hjá búfólkunum. Endamálið má ongantíð verða at metta forvitni hjá øðrum.

Um hendan játtan ikki er givin frammanundan, má starvsfólk gera tað, sum viðkomandi kann, fyri at hjálpa upp á stúranina hjá hinum búfólkunum í støðuni. Tað lættasta og besta vildi verið, um starvsfólk fekk spurt búfólki, sum er burturfrá, hvat tey kunnu sleppa at siga fyri hinum búfólkunum. Um búfólki sjálvt ikki fær svarað fyri seg, at starvsfólk so spyr avvarðandi. Í støðum, har hesir møguleikar ikki eru til staðar, kann starvsfólki greiða búfólkunum frá, at viðkomandi tíverri ikki hevur loyvi at siga nakað. Tað er týdningarmikið ikki at undirmeta førleikar hjá búfólki til at skilja og virða støðuna, sum starvsfólk eru í.

Fremsta uppgávan hjá starvsfólki í støðuni, verður tí at hjálpa búfólkunum at hondtera ta stúran, tey máttu havt, uttan at bróta skylduna, um ikki at lata upplýsingar frá sær uttan loyvi.